Trupult at fingi › grei›ar afturmeldingar

Samstarvi› hjá Føroya Arbei›sgevarafelag vi› oljufeløgini, sum fara í holt vi› boringar komandi summar, hevur í nøkrum førum gingi› tungt, skrivar Vinnuhúsi›

Samstarvi› hjá Føroya Arbei›sgevarafelag vi› oljufeløgini, sum fara í holt vi› boringar komandi summar, hevur í nøkrum førum gingi› tungt, tí at ikki var møguligt at fáa eitt samla svar frá teimum. Oljufeløgini eru nú vi› at skipa seg í eitt felag, og hetta fer at lætta um samskifti framyvir, skrivar Vinnuhúsi›.

Í sambandi vi› fleiri av teimum málum, sum oljubólkurin hjá Føroya Arbei›sgevarafelag hevur arbeitt vi›, hevur ta› veri› heldur trupult at fingi› grei›ar afturmeldingar, tí at hvørt oljufelag ella samtak, bert kundi svara fyri seg sjálvan.

Standardkontraktir

Á fundi í samband vi› oljurá›stevnuna í sí›stu viku, kunna›u umbo› fyri oljufeløgini um ætlanir sínar vi›v. skipan av einum felag – FOIG ella Faroes Oil Industry Group, i› kemur at taka sær av málum, sum vi›koma øllum oljufeløgunum, herundir eisini samskifti vi› myndugleikar og vinnuna.

Millum fyrstu málini, sum Føroya Arbei›sgevarafelag ynskir at vi›gera í hesum høpi, eru: skipan av einari veitaraskrá ella líknandi skipan, sum tryggjar at føroyskir veitarir eru sjónligir yvirfyri oljufeløgunum, og sum samstundis tryggjar at føroyska vinnan ver›ur kunna um útbjó›ingar hjá oljufeløgunum ella stóru veitarum teirra, og standardkontraktir fyri allar vanligar veitingar, skrivar Vinnuhúsi›.

Flóttafólkaprestur fegnast um dóm

Danski presturin, Leif Bork Hansen, fekk mánadagin har›ari dóm í Landsrættinum fyri at hjálpa flóttafólkunum, sum herfyri komu til Føroyar. Men ól‡dni presturin fegnast um dómin

FLÓTTAFÓLK
Magnus Dam
Keypmannahavn

Hetta er tann seinni flokkurin av eysturslavonum, sum hava sett seg ni›ur í Føroyum og sum danski flóttafólkapresturin má bøta fyri

Mynd: Jens K. Vang

Hjá Leif Bork Hansen hevur ta› ongan t‡dning, at hann noy›ist at gjalda 7500 krónur í bót úr egnum lumma fyri at hava hjálpt útvístu flóttafólkunum úr Eysturslavonia. Ta›, sum hevur t‡dning hjá honum, er, at flóttafólkini ikki vór›u víst aftur til heimlandi›, og at flestu flóttafólkini nú liva eina trygga og gó›a tilveru í Føroyum.

Lyngby-presturin hev›i eisini anna› at fegnast um. Ákærin kravdi, at tann treyta›i dómurin uppá 20 dagar hefti, sum b‡arrætturin dømdi hann í fjør, var› gjørdur treytaleysur. Men ta› vildi Eystari landsrættur ikki, og Leif Bork Hansen kundi fara úr rættarhølinum sum ein frælsur ma›ur.

Var›veitir kragan

– Hetta er ein ótrúliga stórur lætti. Eg kann næstan ikki grei›a frá tí. Beint á›renn dómurin var› sagdur, visti eg als ikki, um eg mátti fara higani uttan mítt prestastarv. Eg eri ovurfegin, seg›i Leif Bork Hansen í regninum uttanfyri rættarbygningin.

Hev›i Lyngby-presturin veri› dømdur har›ari revsing enn ein treyta›an dóm og eina bót, so hev›i vandi veri› fyri, at hann mátti leggja prestakragan frá sær. Men nú er ikki líkt til, at dómurin fær a›rar avlei›ingar enn ávaringina, sum hann longu hevur fingi› frá Kirkjumálará›num.

Margrethe Vestager, kirkjumálará›harri, seg›i seg eftir dómin rokna vi›, at Leif Bork Hansen kann halda fram í starvi sínum. Hon hefti seg serliga vi›, at talan framvegis bert er um eina bót, og at rætturin ikki vildi døma prestin í teytaleyst hefti. Bótin hækka›i úr 2500 upp í 7500 krónur, men sum so er einki n‡tt í dóminum, vísti kirkjumálará›harrin á.

– Eg rokni vi› og gangi útfrá, at hetta ikki fær ávirkan á starvsvi›urskiftini, seg›i Margrethe Vestager, sum kortini gjørdi greitt, at lógirnar skulu haldast og bert broytast á demokratiskan hátt.

Fylgdi samvitskuni

Teir seks dómararnir í Eystara Landsrætti vóru samdir um, at Leif Bork Hansen, hevur broti› lógina. Flóttafólkini úr Eysturslavonia høvdu ikki loyvi til at vera í Danmark, og Leif Bork Hansen hev›i hjálpt teimum at savna inn pening. Hetta hev›i hann ikki loyvi til, og ta› er brot á útlendingalógina. Men hóast hetta helt rætturin fast um, at revsingin ikki skuldi gerast treytaleys.

Hjá rættinum hev›i ta› hev›i onga ávirkan á dómin, at flóttafólkini nú eru komin til Føroya í øllum gó›um. Men júst hetta hev›i nógv at siga hjá Leif Bork Hansen, sum er sannførdur um, at hann hevur gjørt ta› rætta.

– Tá eg sá seinastu flóttafólkini flúgva til Føroyar 16. oktober var ta› ein ótrúligur lætti. Eg haldi meg ikki hava gjørt naka› ólógligt, og eg hev›i gjørt ta› sama einafer› afturat. Ta› er altumrá›andi at fylgja sínari egnu samvitsku. Annars ert tú einki, seg›i tann ól‡dni Lyngby-presturin, eftir at tvey ára drúgva máli› umsí›ir var li›ugt.

Leif Bork Hansen vónar, at hann nú kann leggja alt máli› afturum seg og koma ví›ari. Hann takka›i samstundis teimum, sum hava hjálpt flóttafólkunum vi› pengum og á annan hátt.

Útflutningurin av laksi í ár minni

Seinastu 10 vikurnar hevur laksaprísurin veri› stø›ugt fallandi, og prísurin er nú á sama lága stø›i sum um somu tí› í fjør



Vinnuhúsi› skrivar, at seinastu 10 vikurnar hevur laksaprísurin veri› stø›ugt fallandi, og prísurin er nú á sama lága stø›i sum um somu tí› í fjør – uml. 24 NOK/kg (feskur laksur 3-4 kg). Ta› sær tó út sum at prísurin seinastu vikuna hevur stabilisera seg. Prísurin hevur annars higartil í ár veri› høgur, sammett vi› undanfarin ár, og mi›alprísurin fyri ári› hygartil liggur uml. 25% omanfyri prísirnar í fjør.

Í Noreg halda teir, at prísurin nú hevur stabilisera› seg tí, at fleiri av størru framlei›arunum halda aftur vi› tøkuni fyri at ste›ga prísfallinum, og partvís eisini tí, at prísurin nú er komin ni›ur í móti minstaprísinum sambært avtaluni millum Noreg og ES.

Torført at spáa

Gongdin higartil í ár hevur víst, at sera torført er at spáa um prísgongdina. Í Noreg ver›ur nú gitt, at prísurin fer at hækka naka› næstu tí›ina. Tó ver›ur samstundis sagt, at nógv av fiski er klárur at taka, og um nógv av hesum ver›ur tiki› samstundis, kann prísurin aftur fara at kvinka ni›ureftir.

Kurvan ni›anfyri vísir tøkuna higartil í ár í Føroyum. Í nøgd er tøkan væl minni enn vænta›, og er hetta tí, at fiskurin er tikin fyrr enn ætla›, vegna gó›a prísin, sum hevur veri›, og av tí sama hevur støddin á fiskinum veri› minni enn vanligt. Ta› er sostatt greitt, at útflutningurin av laksi í ár, ikki fær tann vøkstur sum spáa var um.

Leggja fram uppskot um n‡val

Sambandsflokkurin og Javna›arflokkurin hava í felag gjørt eitt uppskot til eina løgtingssamtykt um n‡val. Uppskoti› ver›ur bori› løgtingsskrivstovuni í dag

N†VAL
John Johannessen

Bá›ir teir stóru andstø›ulei›ararnir, Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard, fara í dag á løgtingsskrivstovuna vi› einum uppskoti um n‡val

Mynd: Jens Kr. Vang

Sí›ani fullveldissamrá›ingarnar millum landsst‡ri› og donsku stjórnina slitna›u hóskvøldi›, hava teir bá›ir stóru andstø›uflokkarnir arbeitt vi› einum felags uppskoti um n‡val.

Hetta uppskot er nú li›ugt og ver›ur bori› Løgtingsskrivstovuni í dag. Sambært tingskipanini, skulu uppskot liggja á Løgtingskrivstovuni í 48 tímar, á›renn tey ver›a løgd fyri tingi›. Tí kemur uppskoti› í fyrsta lagi fyri tingi› fríggjadagin, um tingfundur ver›ur.

Reinsa luftina

Teir bá›ir andstø›ulei›ararnir, Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard, eru samdir um, at ney›ugt er vi› einum slíkum uppskoti, tá samgogan ikki sjálv vil taka avlei›ingarnar av, at a›almál hennara – fullveldismáli› – er miseydna›.

– Føroyingar kunnu ikki liva vi›, at vi›urskiftini vi› Danmark fullkomiliga eru farin í baklás orska› av atbur›inum hjá landsst‡rinum í fullveldissamrá›ingunum. Tí mugu vit til at betra um vi›urskiftini aftur, og ta› kann eitt n‡valt løgting best gera, sigur Edmund Joensen.

Jóannes Eidesgaard er samdur vi› Edmund Joensen.

– Eitt løgtingsval er ta›, sum reinsar luftina best, sigur Jóannes Eidesgaard.

Bá›ir andstø›ulei›ararnir eru eisini samdir í, at ta› er vanlig mannagongd í einum og hvørjum n‡tímans fólkaræ›isligum samfelag, at eitt miseydna› a›almál hjá eini stjórn, ver›ur gjørt til ein kabinetspurning.

– Samgongan hevur havt fullveldi sum a›almál, og nú hevur hon eftir hálvttri›ja ár rent seg fasta. Hetta fær avlei›ingar í øllum ø›rum demokratiskum londum, vísir Edmund Joensen á.

Ivast í undirtøkuni

Andstø›ulei›ararnir hava valt at leggja uppskoti› um n‡val fyri løgtingi›, hóast teir ikki eru vísir í, at uppskoti› fær undirtøku.

Uppskoti› er eitt uppskot til samtyktar. Eftir tingskipanini merkir hetta, at uppskoti› skal hava tvær vi›ger›ir á tingi og ver›ur endaliga samtykt ella felt vi› a›ru vi›ger›. Andstø›an kundi eisini valt at lagt fram uppskot um misálit á løgmann, men hetta hev›i merkt, at atkvø›ast skuldi beinan vegin.

Tí kann hugsast, at andstø›an hevur valt møguleikan vi› uppskotinum um n‡val, fyri at fáa í lag eitt or›askifti á tingi, i› møguliga kann fáa partar av Fólkaflokkinum og kanska eisini Sjálvst‡risflokkinum at taka undir vi› uppskotinum.

Hetta hava andstø›ulei›ararnir ikki stórvegis vi›merkingar til.

– Eg kann bert siga, at uppskoti› sjálvsagt fellur, um samgongan er samd um sín politikk í fullveldismálinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men eftir tí, Sosialurin hevur frætt frá samgongufundinum í gjár, har samrá›ingarnar vór›u vi›gjørdar, er samgongan ikki samd.

Sambandsflokkurin og Javna›arflokkurin hava tilsamans 13 atkvø›ur á tingi. Fyri at fáa meiriluta fyri uppskotinum er ney›ugt at fáa 17 atkvø›ur fyri tí. Lítli andstø›uflokkurin, Mi›flokkurin, hevur eina atkvø›u, men eftir útsagnunum hjá Mi›flokkinum higartil, fer hann ikki at taka undir vi› einum uppskoti um n‡val.

Tískil mugu tær f‡ra í-restandi atkvø›urnar á ein ella annan hátt fást frá einum av samgonguflokkunum, um uppskoti› skal fáa meiriluta.

Fullveldi› lagt til viks

Landsst‡ri› hevur eftir samrá›ingarnar hóskvøldi› gjørt av at sleppa fullveldisætlanini. Í sta›in ver›ur talan um eina stig-fyri-stig-ætlan

FULLVELDI
Magnus Dam og John Johannessen

– Vit hava sta›fest, at skipanin, sum vit hava arbeitt eftir, har suvereniteturin her og nú er ovasta máli›, er ikki naka›, sum politiskt og innan tí›arkarmarnar førir á mál. Tí hava vit lagt ætlanina á hillina, seg›i Anfinn Kallsberg, løgma›ur vi› Útvarpi› á middegi í gjár.

Løgma›ur bo›a›i frá hesum beint eftir, at hann hev›i veri› á fundi í uttanlandsnevndini og greitt frá um samrá›ingarnar hóskvøldi›. Uttanlandsnevndin var› somulei›is kunna› um n‡ggju kósina, sum landsst‡ri› nú fer at stinga út í korti›.

Anfinn Kallsberg seg›i, at samgongan nú fer at royna a›rar møguleikar. Hann seg›i, at landsst‡ri› í sta›in fyri at mi›a ímóti fullveldi her og nú fer at troyta møguleikarnar, sum liggja í heimast‡rislógini. Samgongan fer at mi›a ímóti at avvikla blokkstu›ulin og annars arbei›a fram ímóti suverena statinum.

Spurdur, hvussu langt áramál landsst‡ri› arbei›ir eftir í n‡ggju ætlanini, seg›i Annfinn Kallsberg, at ta› kann hann ikki svara upp á nú.

Hóast landsst‡ri› fer at arbei›a vi› einari a›rari loysn, so er líkt til, at føroyingar kortini skulu til fólkaatkvø›u næsta ár. Anfinn Kallsberg seg›i vi› Útvarpi›, at ta› so ver›ur hendan n‡ggja skipanin, sum føroyingar skulu taka stø›u til á einari fólkaatkvø›u.

Løgma›ur vísti ikki aftur, at talan kann gerast um at taka eitt nú Javna›arflokkin vi› í arbei›i› at gera eina n‡ggja skipan millum Føroyar og Danmark.

– Skuldi hendan skipanin givi› andstø›uni hug at koma vi› í arbei›i›, so er hon vælkomin, seg›i løgma›ur.

Høgni Hoydal sigur seg ikki hava hoyrt, ta›, sum Anfinn Kallsberg seg›i í útvarpinum. Tí vil hann ikki gera a›rar vi›merkingar enn, at landsst‡ri› enn arbei›ir ví›ari eftir teimum løgtingssamtyktum, i› fyriliggja í fullveldismálinum.

– Vit hava nøkur uppskot, i› skulu vi›gerast í landsst‡rinum, á›renn eg vil grei›a nærri frá, hvat tey snúgva seg um, sigur Høgni Hoydal.

Umhugsa at skerja blokkstu›ulin

Fleiri danskir flokkar meta ta› vera skeivt, at føroyingar eru farnir at spara upp blokkstu›ulin. Tí halda teir, at har›ar treytir eiga at ver›a settar næstu fer› samrá›ast skal um hesa veiting

BLOKKSTU‹UL
John Johannessen

Danskir flokkar undrast yvir, at donsku skattakrónurnar, sum árliga ver›a sendar til Føroya ver›a n‡ttar at spara upp vi›, samstundis sum landsst‡ri› vísir frá sær einum tilbo›i frá donsku stjórnini um at fáa fullveldi vi› einari búskaparligar skiftistí› á f‡ra ár.

Tí halda fleiri flokkar, at stjórnin eigur at seta har›ar treytir, tá danska stjórnin og landsst‡ri› skulu samrá›ast um blokkstu›ulin í endanum av næsta ári.

Hetta skriva›i danska bla›i›, Jyllands-Posten, í gjár. Bla›i› hevur tosa› vi› umbo› fyri fleiri flokkar, og eru hesir samdir um, at stø›an ikki rættuliga hongur saman.

Ein av teimum, i› er mest har›rendur í sínum útsagnum er Jes Lunde frá SF. Hann heldur, at hetta sjálvsagt skal fáa avlei›ingar, næstu fer› samrá›st ver›ur um blokkstu›ulin. Tá føroyingar hava møguleika at leggja so nógv til sí›is og samstundis hava eina mi›alinntøku, i› er hægri enn tann danska, má hetta fáa t‡dning, sigur hann.

Jan Petersen frá danska Javna›arflokkinum vísir á, at ta› ikki er nøkur náttúrulóg, at blokkstu›ulin skal vera eina milliard krónur um ári›. Hann vísir á, at sjálvt um føroyski búskapurin er vi›brekin, benda úrslitini seinastu árini á, at føroyingar sjálvir hava møguleika at syrgja fyri einum størri parti av síni vælfer›.

Elisabeth Arnold frá teimum Radikalu, heldur kortini ikki, at Føroyingar eiga at ver›a revsa›ir eftir vánaliga úrsliti› í fullveldissamrá›ingunum. Men hon heldur ta› vera løgi, at føroyingar ikki kunnu taka ímóti eini skiftistí› á f‡ra ár.